# Ein heilsan til Ara

*Lag: Vestland…..*

*Nú Jesus Pápi teg hevur tikið heim*
*Í Himmalin, har bert er gleði og gleim*
*Vit eftir sita her og spyrja HVÌ*
*Ei longur sleppa kyssa fitta snýð*

*Tú veikur vart, vit royndu hjálpa tær*
*Tú fylti nógv og altíð glaður var*
*Tú stríddist her, nú hevur fingið frið*
*Ein lítol eingil er við Jesu lið*

*Tú lítli eingil hjá Jesus Pápa er*
*Vit elska teg yvir alt í verð*
*Má Jesus Pápi teg goyma væl hjá sær*
*Til ein dag, vit øll síggjast aftur har.*

VIT ELSKA TEG YVIR ALT

**Mamma, babba**
**Rói & Rebekka**



†

## Andlát og jarðarferðir

Hósdagin 25. september, andaðist í Hirtshals Marni á Lakjuni, 57 ára gamal.

**Dagurin**
**30. september. Hieronymus**, deyður í 420. Tann lærdi kirkjulærarin, sum var komin úr Stridon í Bosnia. Í Róm var hann skrivari hjá pávanum Damasusi Fyrsta, sum setti hann at týða bíbliuna av nýggjum. Úrslitið var tann latínska bíblian Vulgata, ið enn verður nýtt í katólsku kirkjuni. Vulgata merkir tann, ið vanliga verður nýtt. Hieronymus doyði sum abbati í einum kleystri í Betlehem. Saman við Ambrosiusi, Augustinusi og Gregori ein av katólsku kirkjufedrunum.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum teimum, sum sýndu samkenslu og fylgdu manni og pápa okkara

**Mervin Thomsen**
Hvalba

til hansara seinasta hvíldarstað.
Tøkk til manningina á Steintór, fyri at tit tóku hond um hann, tá hann gjørdist sjúkur umborð.
Tøkk til starvsfólk á B7, sum tóku sær av honum, tíðina hann var har.
Tøkk til Poul Færø fyri troystarrík orð á kapellinum.
Tøkk til tey, sum hjálptu til ervinum, kokkarnar, hjálparfólk og tey, sum komu við mati.
Tøkk til Símun prest fyri góð og vøkur orð.
Tøkk til gravarar, sangarar og kirkjutænararnar. Tøkk til berarar, familju, vinir og onnur, sum á ein ella annan hátt vóru hjá, tá ið á stóð.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur, ið vórðu latnar Hvalbiar kirkju

*Fyri tey avvarðandi*
**Una, Jari og Gunnhild**

# Tøkk



Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og umsorgan, tá kæri maður, pápi og verfaðir okkara

**Andrias Olivur Pauli Djurhuus**

andaðist, bert 57 ára gamal.

Ein serstøk tøkk til Patrick prest fyri góð og troystarrík orð bæði í kapellinum og í kirkjuni.
Eisini ein serlig tøkk til kirkjutænarar, organist, sangarar, berarar og til tykkum øll, sum hjálptu til við ervinum.
Takk fyri blómur, kransar, heilsanir og peningagávur til missiónshúsið í Porkeri.
Hjartans tøkk til tykkum øll, sum fylgdu Andriasi til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Sidana, Kristina og Páll**

# Tøkk



Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá okkara høgt elskaði sonur og beiggi

**Ari Egilstoft Hentze**
Sandavágur
f. 24.02.06 – d. 28.05.08

brádliga andaðist.
Tøkk til starvsfólkini á B5, sum altíð tóku sær so væl av okkum.
Tøkk til Ingu Dam fyri góð og troystarrík orð í kirkjuni.
Tøkk til Jens Súna og Dortheu fyri vakran sang í kirkjuni.
Tøkk til Eydnu og Jensiu fyri klaverspæl.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar, berarar og tann stóra skara, sum fylgdi Ara til hansara seinasta hvíldarstað.
Tøkk til bindiklubban, sum skipaði so væl fyri ervinum, og tykkum mongu, sum hjálptu til, tit í Søljugarði og barnagarðurin hjá Ara í Havn.
Ein serstøk tøkk til okkara familju og vinir, sum vóru og eru um okkum, og tóku sær so væl av okkum, tá vit komu heim við Ara.
Tøkk til tykkum øll, sum komu inn á gólvið hjá okkum, tøkk fyri heilsanir, sms, uppringingar og tøkk til tykkum, sum bakaðu.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur til B5.
Tøkk fyri umsorgan í hesi sváru tíð.

*Heilsan*
**Sunnuvá, Emil, Rói og Rebekka**

*Vit vilja heldur missa teg,*
*enn ongantíð hava kent teg*

Sosialurin Sosialurin Sosialurin -har tað hendir

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við